DAGSINS MEINING

Endurskoðan

Karsten Hansen fortelur, at hann hevur sett pening av til at endurskoða tað almenna fyri at spara pengar. Um hann tosar um eina endurskoðan av bygnaðinum, so hevur hann misskilt sína uppgávu. Fíggjarmálaráðið er eitt ráð eins og øll onnur ráð, og tí eigur tað ikki at vera tann partur, ið endurskoðar tað almenna. Eisini kundi man spurt, hvør so endurskoðar Fíggjarmálaráðið.

Løgmaður hevur evstu ábyrgd av starvsfólkamálum og bygnaði, og tí eigur peningur til endurskoðan av almenna bygnaðinum at vera latin Løgmansstjóranum, ið so eigur at verða heimilað at finna nøkur fólk at endurskoða almenna bygnaðin, ið ikki starvast í tí bygnaði, tey skulu endurskoða. Talan kundi til dømis verið um eina nevnd av nøkrum fáum fólkum við innliti og royndum í at trimma organisatiónir, heldur enn at vaksa um organisatiónir. Sera týdningarmikið er, at hesi fólk hava fjølbroyttar royndir og ikki hava slitið sínar barnaskógvar í núverandi bygnaði. Ikki tí, at tey nýtast at vera verri fyri fakliga av tí grund, men tað er ov nógv at krevja av fólki, at tey skulu kanna seg sjálvi.

Ein endurskoðan av einum bygnaði krevur, at tosað verður við allar teir relevantu partarnar sum eitt nú fakfeløgini á økinum, ið ivaleyst hava nógv góð hugskot at geva av. Aftur her vildi tað verið ein fyrimunur, at inndrigið fólk, ið ikki hava sína dagligu gongd í umsitingini, og ikki skulu hava sína framtiðar gongd har.

Núverandi bygnaður hevur fleiri innbygdar feilir, fyriuttan at verða ov dýrur í rakstri. Rakstrarkostnaðurin kann fáast niður við øktari samskipan av funktiónum sum løfroði, felags innkeypi o.s.fr. Onnur óheppin ting eru í bygnaðinum. Eitt tað mest óhepna er, at kærustovnar liggja undir umsitingini. Hetta merkir, at um ein borgari kennir seg illa behandlaðan av eitt nú skattavaldinum, so skal hann kæra til sama ráðið, ið hann kærir um. Hetta er sera óheppið. Tað kann vera, at slíkar skipanir rigga í stórum ministerium í øðrum londum, men í Føroyum eru tingini ov nær at hvørjum øðrum. Eitt gott hugskot kundi verið, at lagt allir kærustovnar undir løgtingsumsitingina sum ein kærustovn. Hetta hevði merkt, at løgtingsumsitingin so hevði kunnað verið tann instansur, ið tók sær av klagum um ymsu ráðini, og ikki ráðini sjáv, ið eisini høvdu minkað av einari slíkari broyting.

Tað er gleðiligt, at man umsíðir tekur sær um reiggj, og endurskoðar bygnaðin, so at hann tilpassar seg fólkagrundarlagið og fíggjarligu orkuna í Føroyum, heldur enn at forvænta tað øvugta.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Viðv. uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður
Vinnumálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn
Tórshavn, hin 4. november 2002

Undirritaðu feløg hava fingið til ummælis nevnda lógaruppskot.

Vit kunnu ikki annað enn taka undir við, at tíðarskeiðið, har møguleiki er at fáa farloyvi, verður longt.

Vinnumálastýrið leggur eftir teimum lægstløntu

Tá Vinnumálaráðið við uppskotinum um broyting av § 12 leggur upp til, at reglan um 6 mánaðar útrokningargrundarlag innan fyri 12 mánaðirnar, verður strikað, so skulu vit harðliga mótmæla hesari broyting.

Talan er um sama uppskot, sum landsstýrismaðurin legði fram 7. november 2001 (løgtingsmál nr. 30), og í viðmerkingunum til hetta uppskot varð m.a. sagt:

> ***Fyri tann, sum móttekur barsilspening og hevur broytingar í inntøku, hevur lógaruppskotið við sær fyri bólkin sum heild, at tey fáa minni úr skipanini.***

Hvørji er tey sum hava "broytingar í inntøkuni" ??. Jú tað eru tey tímaløntu, sum frammanundan í flestu førum hava eina miðalinntøku, sum liggur millum kr. 10.000,00 og 15.000,00 um mánaðin.

Vit fara undir ongum umstøðum at góðtaka, at ein slík skerjing í rættindunum hjá teimum sam-felagsborgarum okkara, sum frammanundan eru ringast fyri, verður framd.

Roynir Vinnumálaráðið at fjala veruligu avleiðingarnar av uppskoti teirra?

Uppskotið til nýggja orðing av § 12 er orðarætt tað sama, sum uppskotið frá 2001, men kortini so skrivar Vinnumálaráðið einki um, at avleiðingin av uppskotinum verður, at tey lægstløntu fáa minni úr skipanini.

Tá Vinnumálaráðið í november 2001 greitt ásannar, at hetta verður avleiðingin fyri tey lægstløntu, so er tað merkisvert at sama Vinnumálaráð einki nevnir um hendan veruleika, nú tit enn einaferð royna at fáa Løgtingið at lækka útgjaldið til tey tímaløntu.

Ein kann tí hava illgruna um, at Vinnumálaráðið við vilja roynir at fjala, at avleiðingin av uppskoti teirra verður, at tey sum frammanundan er ringast fyri fíggjarliga fáa minni í barsilspeningi.

Vinnumálastýrið roynir snildisliga at tengja eina munandi lækking av upphæddini til tey lægstløntu saman við leingjan av barsilstíðarskeiðinum

Í sambandi við lógaruppskotið hevur Vinnumálaráðið tengt hetta ódámliga uppskot um skerjing í upphæddini til tey tímaløntu, saman við uppskotinum um at leingja farloyvistíðina.

Hetta er helst gjørt fyri at royna at fáa skerjingarnar í útgjaldingini til tey lægstløntu samtykta, men vit vóna at bæði samgongutinglimir og andstøðutinglimir duga at siggja taktikkin hjá Vinnumála-ráðnum og ikki lata sær linda, at slíkar skerjingar verða framdar í útgjaldingini til tey lægstløntu.

Hví skulu øll uppskot frá verandi samgongu raka tey sum frammanundan hava lægstu inntøkurnar?

Tað er hugstoytt at síggja, at uppskotini frá verandi samgongu ferð eftir ferð raka tey í samfelag okkara, sum frammanundan er ringast fyri.

Hvør er orsøkin til, at flokkar í samgonguni, sum alment siga seg vilja bøta um umstøðurnar hjá teimum sum eru ringast fyri, tykjast at hava gloymt øll hesi føgru orð, og glaðbeint taka undir við teimum mest asosialu uppskotunum frá høgravonginum í samgonguni?

Eftirlit kann forða fyri møguligari missnýtslu

Um Vinnumálaráðið heldur, at skipan verður misbrúkt, so eru tað í hvussu so ikki tey tímaløntu, sum misbrúka skipanini, tí tey hava ikki møguleika fyri at fremja slíkt missbrúk.

Vinnumálaráðið átti tí at sett eitt munagott efturlit, sum kundi forða fyri møguligum misbrúki, um tað eru slík viðurskifti, sum liggja aftanfyri ynskini um at broyta lógina.

Hví verður ikki skarvað av hjá teimum sum frammanundan forvinna kr. 35.000,00 um mánaðin?

Hvussu asosialt hetta lógaruppskot er, fáa vit veruliga prógv fyri, tá vit síggja, at Vinnumálaráðið ikki ætlar at skerja upphæddina hjá teimum sum frammanundan eru so væl fyri, at tey forvinna heilar kr. 35.000,00 um mánaðin.

Vit unna øllum løntakarum full endurgjald fyri lønarmissin, tá hesir løntakarar fara í barsilsfarloyvi, men tað kann ikki vera rætt, at Vinnumálaráðið ætlar at lækka upphæddina munandi hjá teimum tímaløntu, tá tey fastløntu famvegis hava møguleika at fáa upp til kr. 35.000,00 um mánaðin frá barsilsskipanini. Hjá teimum tímaløntu telur hvør einasta króna.

Hvat siga hinir samgonguflokkarnir og andstøðan?

Vit eru spent at síggja hvat samgongutinglimir og andstøðan siga til hendan ágang móti teimum lægstløntu.

Vit fara at heita á allar tinglimir um at vísa aftur hesum álopi á tey lægstløntu í samfelg okkara.

Áheitan á allar limir okkara

Samstundis skulu vit boða frá, at vit fara at heita á allar limir okkara um at fylgja væl við, tá nevnda lógaruppskot kemur í Tingið, tí limir okkara fara neyvan at gloyma hvørjir flokkar verja áhugamál teirra og hvørjir flokkar eru við at skerja útgjaldið til hendan samfelagsbólk, sum frammanundan er ringast fyri í samfelag okkara.

Áheitan á Bjarna Djurholm

Við teimum grundgevingum sum vit hava víst á frammanfyri, fara vit við hesum inniliga at heita á tygum um at sleppa uppskotinum um at broyta § 12, tí hetta uppskot fer at hava sera óhepnar avleiðingar fyri tey tímaløntu.

Við vón um at tygum eftirlíka áheitan okkara.

Avrit av hesum skrivi er sent øllum politisku flokkunum og fjølmiðlunum.

Við heilsan

Føroya Arbeiðarafelag
Havnar Arbeiðsmannafelag
Havnar Arbeiðskvinnufelag

Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag

Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Fimleikafagnaðurin 2002 – hvar var SvF?

Lív Reinert Kjeld

Í vikuskiftinum var Fimleikafagnaðurin 2002. -Eitt tiltak, ið Føroya Fimleikasamband skipar fyri annaðhvørt ár. Fimleikafagnaðurin er nakað serstakt innan føroyska ítróttarheimin. Tað er ikki bara ein vanlig kapping, men eitt sera stórfingið og væleydnað tiltak, sum øll, ið hava áhuga fyri fimleiki, eru sera glað fyri.

Fimleikur er ein ítróttargrein, sum hevur stóran áhuga millum Føroya fólk. Langt yvir 2000 íðkarar gera fimleik hvønn vetur í teimum seks feløgunum, sum eru.

Tiverri sleppa bara umleið 1200 fólk at síggja fimleikafagnaðin, av tí at tað ikki ber til at hava fleiri enn 400 áskoðarar til hvørja sýning, og tí at Norðurlandahúsið er so nógv upptikið av øðrum tiltøkum, so møguleiki er ikki at hava fleiri sýningar.

Tí mátti tað verið ein sjálvfylgja, at SvF var á staðnum og tók upp, soleiðis at allir føroyingar høvdu møguleika at síggja hesa serstakliga vøkru framførslu.

Havi hoyrt okkurt um, at ein orsøk, at SvF ikki var og tók upp, er at tað er ov myrkt undir sýningunum; tá mátti tað verið so líka til hjá sjónvarpinum at komið til royndarsýningina, har teir kundu sett tey neyðugu ljósini upp.

Men Sjónvarp Føroya hevur ikki víst fimleikinum stórvegis áhuga. Tað einasta, ið hevur verið víst seinastu nógvu árini, er stórkappingin fyri eldru liðini 2002, sum var í Havn. Tá fekk Føroya Fimleikasamband við neyð og deyð yvirtalað SvF at koma at taka upp. - Og hetta, sjálvt um nógv fleiri tiltøk eru um árið: fimleikaframsýningar úti í hvørjum einstøkum felagi, stórkappingar fyri yngru liðini, liðkappingar í reiðskapsfimleiki, og so sjálvandi eisini FM í reiðskapsfimleiki.

Sjónvarp Føroya kundi eftir øllum at døma ikki lagt minni í, um fimleikur yvirhøvur verður íðkaður í Føroyum; hetta er alt ov vánaligt, tá hugsað verður um, at SVF eigur at vísa tíðindi úr øllum tí føroyska ítróttarheiminum, og ikki bara teimum ítróttargreinum, sum ávís tíðindafólk hava áhuga fyri. Hvussu nógvar hundraðtúsund krónur verða ikki nýttar til fótbólt, hondbólt, flogbólt og aðrar ítróttargreinir árliga?

Hinir fjølmiðlarnir hava heldur ikki nógv at reypa sær av...tað tykist, eins og fimleikur ikki er mettur at vera verdur at siga frá, og tað er út av lagi vánaligt!

Tað næsta stóra tiltakið innan føroyska fimleikaheimin, eru stórkappingarnar fyri pinkur, smágentur, gentur og kvinnur, sum verða 8. og 9. mars 2003. Hesar kappingarnar verða í Eysturoynni, og tí eru vónirnar lítlar fyri, at SVF verður á staðnum. Eg havi enn ikki hoyt grundgevingina fyri, hví Sjónvarp Føroya ikki kann koma inn í Eysturoynna at taka upp; tað er kanska eisini at krevja ov nógv...tað er so langt at koma allan vegin úr Havn; tá er tað allarhelst lættari og bíligari at senda nøkur tíðindafólk til Litava og Týsklands...

En kæmpebedrift

Hans Jensen
Hvalvík

Til de mange store ærefulde bedrifter dette landstyre har gjort for os, folket, kan der nu tilføjes endnu en. Landstyret har på kort tid klaret, hvad andre forgæves har forsøgt i årevis: at engagere folket lidenskabeligt i storpolitik.

Hvori ligger deres succes? Jo, man har klart indset, at skal man mobilisere folket, må man holde op med at ævle om ubetydelige bagateller som finanslov, der ikke holder, fiskeritilladelser, der ikke overholdes og lignende. Intet af dette kan få den intelligente vælger op af sofaen. Nej, i stedet har man forstået at tage politiske stormål som bøsser, skøger, pornokanaler og usædelig kultur op til debat.

Pletskud! En hidtil ukendt resurse af interesse for storpolitik er dukket op fra folkets dyb, og viser dagligt sin styrke i begavede, saglige og videnskabelige kommentarer i radio, TV, fra tingets talerstol og i talrige sagkyndige lægmænds udtalelser til Gud og hvermand. Græsrødderne rører på sig.

Åh! - den ekspertice. Alle og enhver udtaler sig med forunderlig indsigt i alskens perverteret udskejelse med en sa(g)lighed, der må have krævet indgående studier. Man imponeres af al den lidelse, det må have kostet alle disse eksperter at skaffe sig den fornødne indsigt i disse modbydeligheder. Vi bygdefolk er målløse, og har svært ved at følge med i alle de nyeste obskøniteter, der bliver introduceret fra Torshavn.

At Torshavn er Sodoma og Gomorra, det har vi vidst længe, men at det stod så galt til, var vi ikke klar over. (1. Mos. kap. 18 og 19).

Skøger i Torshavn

Ja, kunne man forvænte andet. Vi er en lille kreds af bygdemænd, der flere gange har været på studietur til Havn i panseret mandskabsvogn for at se på afskyelighederne. Det er endnu ikke lykkedes os at lokalisere lastens hule, men vi giver ikke op. Hvo som søger – han finder.

Det må stoppes omgående, og da det efter eksperternes mening er olieindustrien, der er roden til ondet, er mit forslag, at vi holder op med at lede efter olie. Godt nok vil vi gerne være underleverandører til olieindustrien, men det skal være over færøsk kajkant og ikke sengekant.

Pornokanal +

Dette brandaktuelle emne har krævet en betydelig investering i parabol, licenskort o.s.v. for i det hele taget at få en anelse om, hvad de høje tingmænd i deres umådelige visdom taler om. Vi har nu i fællesskab købt udstyret, og har med møje fået det til at fungere. Men vi er ikke blevet klogere. I de fleste film, vi får ned fra nettet, løber folk bare rundt og grynter, og filmene er meget dårligt tekstet, så vi er nødt til at gætte os til handlingen. Et mindste krav må være, at de bliver tekstet på færøsk. Men bortset fra, at vi ikke helt er på det rene med, hvad det drejer sig om, støtter vi ubetinget landstyret i dets bestræbelser for at stoppe dette svineri. Da parabolantenner helt oplagt falder ind under pornografiloven – »ting der kan bruges til at udbrede usædelighed« – går jeg ud fra som givet, at der straks iværksættes en landsomfattende destruktion af alle parabolantenner.

Bøsser

Det er helt forståeligt, at landet ligger politisk lammet et par ugers tid, så politikerne i ro og mag kan få tid til indgående diskussioner med udsendte missionærer fra bøssernes befrielsesfront. Et meget alvorligt emne, der kan få alvorlige konsekvenser for befolkningstilvæksten, hvis det ikke stoppes omgående. Selvfølgelig skal vi stiltiende acceptere at de er til – lige som muhamedanere og offentlige ansatte, men intet blåt stempel. »De skal bare omvende sig« udtaler en af vore toppolitikere, og jeg er enig. Hvis de bare ville vende sig om, var problemet løst. Ellers er det noget, vi her ude på Bygd ikke har de store forudsætninger for at vurdere, da vi er erotisk helt ude af trit med resten af landet, men, – at det skal stoppes, er der ingen tvivl om. Og man skal være på vagt!!! Vi havde et kaninpar, der levede i et lykkeligt harmonisk parforhold til alles udelte fornøjelse, indtil vi opdagede, at det var to hanner. Vi kastrerede dem naturligvis straks, men heraf kan man lære, at Synden er overalt.

Fordærvet kultur. Entarte

Som en af de mange, der heller ikke har set Ginusøgur, vil jeg straks med stor autoritet tilslutte mig vore tingmænds fordømmelse af dette nedbrydende juks, der kun har til formål at bringe vor uskyldsrene og ufordærvede ungdom ud i rendyrket liderlighed. Selv socialisterne kan se, at det er for langt ude. Og så for offentlige midler. Nej, siger vi, – folket.

Og når vi nu er ved at kigge på, hvad landet støtter, ja, så er der jo bibliotekerne med deres tonsvis af smudsig litteratur, tvivlsomme skolebøger og computerer, der gør det muligt for selv sinker at være opdateret med diverse seksuelle udskejelser. Der må arbejdes alvorligt på at nedlægge internettet øjeblikkeligt. Forleden skulle jeg lede efter en sextant på nettet, men jeg var ikke kommet længere end til sex på tastaturet, før skærmen var fuld af grufulde uanstændigheder. Heraf kan vi lære, at selv den uskyldigste kan komme ud på et skråplan uforskyldt.

Landsstyrets 10 ende

Der er så meget smuds under bælstestedet på Færøerne, at jeg ikke ser nogen anden mulighed end, at vi opretter endnu et ministerium, det tiende – 10 er såden et pænt rundt tal – med ministre, underdirektører, administration og glaskontor. Så kan landstyret tilføje endnu en triumf til sine mange, nemlig: at slå sin egen rekord på 1,1 milliard i forhøjet administrationsomkostninger. Selv om det nok vil være vanskeligt, er der nok nogle, der vil ofre sig som frivillig arbejdskraft til censur og den slags sure arbejde, der jo desværre skal gøres. Vi er mange der brænder for sagen. Navneforslag til det 10 ende: Sædelighedsministeriet? Ministeriet til kønsdriftens formulering? Driftsministeriet?

P.S.: Jeg vil i beskedenhed henlede landsstyrets opmærksomhed på en annonce på forsiden af Sosialen fra Siri. Er der ikke grundlag for en forespørgsel til ministeren?

P.P.S.: Hvis du, ligesom jeg, ønsker et intolerant og inhumant samfund, så husk at skrive under på adressen for et kristent samfund og mod humanisme.

Komandi Prix Føroyar, eitt vónbrot

Hergeir Staksberg

Nú tað verður farið í holt við Prix Føroyar aftur, munnu tað vera nógv, ið gleða seg. Tí tað kemur eitt ella annað yvir tí føroysku atmosferina hetta tiðarskeiðið og nýggir tónleikabólkar síggja dagsins ljós. Men í ár verður hetta øðrvísi. Undanfarin ár, hevur tað verið fastur táttur, at teir bólkarnir, sum í undanumførunum gjørdust nr. 1 og 2 komu viðari í finaluna. Í 2003 er tað meiningin, at hetta skal broytast. Nú er ætlanin, bert at lata nr. 1 koma viðari og harvið missa allar bólkarnar, ið blíva nr. 2.

Hetta fer at fáa alvorligar avleiðingar fyri tað føroyska tónleikalívið, um hetta gerst til veruleika. Taka vit til dømis Prix 99 undanumførini, so gjørdist Kjølar nr. 1 og Flux nr. 2 í tí fyrsta umfarinum, sum var á Tvørøyri. Um vit skulu ganga eftir tí nýggja mátanum, so hevði Flux ikki verið komnir í finaluna, og harvið bert verið ein døgnfluga í føroyskum tónleikahøpi. Um vit tonkja uppá júst hetta umfarið, so var tað Flux, sum hevði eitt tað størsta hittið hetta árið, við Mr. Headless, meðan Kjølar ongantíð rættiliga hittaði.

Taka vit annað umfarið, ið var í Miðvági gjørdist stoðan tann, at Clickhaze gjørdist nr. 1 og Mc Hár nr. 2. Hyggja vit nærri at hesum umfarinum, so kunnu vit siga, at í sjálvari finaluni gjørdi Clickhaze, sum var nr. 1 í innleiðandi umfarinum, seg ikki galdandi mill-um tríggjar teir bestu bólkarnar í finaluni, men tað gjørdi Mc Hár, sum gjørdist nr. 2 í innleiðandi umfarinum har aftur-ímóti. Mc Hár gjørdist nr. 3 í finaluni og var lagið »Murder#1« hjá Mc Hár sera væl umtókt.

Triðja umfarið er ikki so nógv at siga um, uttan at vit høgdu mist Visible Fish har, men taka vit fjórða umfarið, har ið Taxi gjørdist nr. 1 og Tangz nr. 2, so síggja vit, at um dystast verður eftir tí nýggju skipanini, so høvdu vit verið Tangz, ið hevur verið ein tann best umtókti bólkurin seinastu tíðina, fátækari.

Meiningin við tí nýggja mátanum er, at hækka stoðið! Persónliga dugi eg ikki at síggja, hvussu stoðið skal hækka, heldur beint øvugt. Um Prix fyrireikararnir fyritrekkja, at vera fyri uttan Mr Headless og Flux, Mc Hár sum endaðu á triðja plássi í finaluni, Visible Fish og at enda Einglanna Hav og Tangz. So eru teir á rættari leið, men hjá einum hvørjum tónleikara og tónleikaáhugaðum eigur ein klokka at ringja og siga, at hetta er eitt látur ligt system. Við vón um, at fyriskiparnir tonkja yvir stoðuna og síðani rætta uppá sínar feilir.